Súni og teir spældu javnt

Seinasti venjingardysturin hjá Viborg áðrenn superligan byrjar aftur, varð spældur fríggjadagin ímóti HJK Helsinki. Dysturin endaði við javnleiki 1-1. Súni Olsen varð á beinkinum hjá Viborg, men hann varð sendur á vøllin í seinna hálvleiki. Viborg hevur spælt átta venjingardystir í ár. Teir hava vunnið tveir, tapt tveir og hava spælt fýra javnar.

Vit eru truplir at vinna á

Venjarin hjá Súna Olsen í Viborg, Hans Eklund, hevur, at liðið hjá honum er við at verða klárt til superliguna.
- Vit høvdu sjálvandi viljað vunnið seinasta venjingardystin, men hesin javnleikurin vísir enn einaferð, at vit eru ikki lættir at vinna á, sigur Hans Eklund, sum fegnast um, at avrikini hjá hansara liði hava verið meira støðug seinastu vikurnar, enn tey vóru í superliguni í heyst.

Óhappini skola yvir Henrik

Við fýra málverjum á skaðalistanum er einki forgjørt í, at Henrik Larsen ivast í, um eitt forbannilsi hvílir yvir kreppurakta felagnum

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað hevur leingi staðið illa til hjá Køge. Fyrsta hálva árið hjá Henrik Larsen gekk annars sum eftir ánni, og fyri góðum ári síðani var Køge á uppflytarakós, tá farið varð í vetrarsteðg.

Her stóð tó greitt, at góða gongdin ikki kundi halda fram. Felagið megnaði ikki at røkja fíggjarligu skyldur sínar, og hetta kostaði. Bæði á stigatalvuni, har lið-

Fýra málverjar eru á skaðalistanum hjá Henrik Larsen, nú hann roynir at fyrireika Køge til várhálvuna

ið varð dømt at missa stig, og eisini á vøllinum, tá fleiri av profilunum á liðnum valdu at skifta felag.

Fíggjarviðurskiftini eru enn ikki komin í rættlag, og hóast Køge enn ikki er sent í skiftirættin, so hevur felagið ikki loyvi at skriva nýggjar yrkissáttmálar við spælarar.

Fýra skaddir málverjar

Tað ger sjálvandi, at Henrik Larsen ikki hevur bestu umstøður at fyrireika seg, nú seinna hálva av donsku 1. deild fer ígongd. Men støðan á málverjaplássinum er mest sum katastrofal.

Hósdagin gjørdist Vahid Ghiasvand fjórði málverjin á skaðalistanum hjá fyrrverandi føroyska landsliðsvenjaranum. Hann kundi tó troysta seg við, at royndi Simon Miotto var komin seg yvir sín skaða, og tí stóð hann í málinum, tá Køge spældi venjingardyst móti AB.

Men har gekk aftur galið. Bert lítil løta var farin av dystinum, tá Miotto rendi saman við Patrik Wozniacki hjá AB, og málverjin noyddist á sjúkrahúsið við einum broti í fótinum.

- Eg veit ikki, hvat eg skal siga. Hetta er jú púrasta sjúkligt, og eg havi ongan tíð upplivað nakað líknandi. Tú skuldi pínadoy trúð, at vit bukaðu málverjarnar við gassum ella onkrum líknandi, men tað gera vit altso ikki, sigur Henrik Larsen við heimasíðuni, bold.dk.

- Teir rendu saman og komu at sparka hvønnannan, so eg rokni við, at fóturin aftur er brotin. Í øllum førum søgdu teir seg hoyra eitt knekk, og á sjúkrahúsinum sóu læknarnir, at ein riva var í fótinum, sigur Henrik Larsen.

Køge vann annars dystin móti AB 2-1.

H71-StÍF 22-21 (10-13):

Oddaliðið fall

Seinastu tíggju minuttirnar var betur tendraða heimaliðið omaná, og so mátti StÍF heim við einum óvæntaðum tapi

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Hóast munurin á stigatalvuni verður toygdur, so hvørt sum kappingarárið líður, so er munurin ikki størri enn so, at stríðast skal fyri hvørjum tí einasta stigi.

Og um ikki annað, so fekk StÍF ta læruna við sær, tá teir vitjaðu í Hoyvíkarhøllini sunnudagin.

Á pappírinum skuldi StÍF nevnliga verið sterkara liðið, og ofta hava innanhýsis uppgerðirnar millum feløgini givið stórsigurin til eysturoyingarnar.

Men fyri tað løgdu hoyvíkingar stóra orku í dystin sunnudagin. Teir buldraðu avstað frá fyrsta bríksli, og tó at StÍF raknaði við, sum fyrri hálvleikur gekk, so vildu teir á heimaliðnum veruliga prógva, at javnleikurin móti Kyndli ikki var íkomin av tilvild.

Um miðjan hálvleikin fekk StÍF tó vent dystinum, og gjøgnum størsta partin av seinna hálvleiki hildu teir eisini fast um vunnu leiðsluna.

Hoyvíkingar noktaðu tó at geva seg, og seinastu løtuna av dystinum settu teir endaspurtin inn. Ikki minst takka verið góðum verju- og málmansspæli. Soleiðis fekk StÍF bert eitt mál seinastu 13 minuttirnar, og tað var ikki nóg mikið til at halda hart arbeiðandi vertunum niðri. Og so kundu gestirnir bara iðra seg um, at Davic Edvardsen ikki punkteraði spenningin, tá hann hevði møguleikan at økja til 22-20 úr sjey metrum

Annað enn sum styrkur av sjálvsálitinum kann H71 ikki brúka sigurin til, men hesin undirstrikar tó viljan hjá spælarunum til altíð at gera sítt besta, tá farið verður á vøllin.

Hján StÍF tænti tapið hinvegin sum áminning um, at júst tað at gera sítt besta, altíð er neyðugt. Og fáa teir ikki lyft álopsspælið nakað heilt fitt undan finaludystunum, kunnu trupulleikarnir væl gerast alstórir, tá endaliga plaseringin av FM-heitinum skal avgerast.

FAKTA

H71-StÍF 22-21 (10-13)
10 min: 6-4
20 min: 7-9
40 min: 15-17
50 min: 18-20
Málskjúttar
H71: Dánjal Tórgarð 8(2), Esbern Patursson 4, Poul Kjartan Dam 3, Hans Kári Hansen 2, Johnny Durhuus 2, Rógvi Sørensen 2, Niels Viggo Niclasen 1
StÍF: David Edvardsen 7(1), Leivur Justinussen 4, Borgar Danielsen 4, Danni Syhler 3, Rúni Niclasen 2, Alexandur Johansen 1
Brotskøst: H71 3, StÍF 2
Útvísingar: H71 4, StÍF 2
Diskvalifikatión: H71 1(3X2 minuttir)
Dómarar: Hanus Kúrberg & Hans Thomassen

VB-VÍF 36-26 (15-14):

VB heldur vónini

VB greiddi sína skyldu, tá VÍF vitjaði. Men tær skulu hava hjálp frá StÍF, um Neistin skal yvirhálast á málstrikuni

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

VÍF argaði annars nakað nógv sunnudagin. Eftir ein fyrra hálvleik, har VB hevði verið leikliga omaná, settu gestirnir veruliga ferð á seinastu løtuna undan steðginum.

Bert eitt mál var á muni, tá liðini fóru til hálvleik, og í løtunum eftir steðgin stóð ferðir á jøvnum, meðan áskoðararnir gjørdust alt meira spentir.

Men so loysnaði. Laila Jespersen og Daiva Toumaite drógu liðfelagarnir við sær, og tó at VÍF royndi at venda gongdini við einum time-out, so beyð ikki bøtur. VB hevði veruliga fingið flogið aftur, og so gjørdist talan at enda um veruliga stórsigur.

Hvør nytta er í hesum, er tó ilt at meta um. VB hevur ikki lagnuna í egnum hondum, og tí mugu tær bara gera sítt – eisini í seinasta dystinum. Tá skal Neistin spæla útidyst móti StÍF, og megnar heimaliðið tá tað óvæntaða, er tað uppgávan hjá VB at lofta einum óvæntaðum finalubólti.

Eina løtu hevði VÍF VB á knøunum, men Laila Jespersen og Daiva Toumaite vildu tað tó øðrvísi
Mynd: Johannes Andreasen

FAKTA

VB-StÍF 36-26 (15-14)
10 min: 7-5
20 min: 10-8
40 min: 23-18
50 min: 28-22
Málskjúttar
VB: Daiva Toumaite 16(2), Laila Jespersen 8, Carol Kjærbæk 3, Bára Mortensen 2, Sváva Vestergaard 2, Monica Samuelsen 2, Christina Holm 2, Una Egilsdóttir 1
StÍF: Fríða Marjunardóttir 6, Liljan Djurhuus 5(1), Torgunn Johannesen 5(1), Elisa Leo 3(1), Ioana Rapa 3, Heidi Joensen 3, Rannvá á Rógvu 1
Brotskøst: VB 2, VÍF 4
Útvísingar: VB 3, VÍF 6
Dómarar: Kristian Joensen & Karstin Joensen